## Peningarstovnarnir hækkar rentuna

Lægsta bústaðarrentan hjá Føroya Banka hækkar við 0,30 prosentstigum, úr 4,45 prosentum upp í 4,75 prosent. Samstundis hækka flestu innlánsrentur við 0,25 prosentstigum. Eitt nú hækkar rentan á 60-ára konto upp í 3,50 prosent. Trygga bústaðarloysnin, Fastlán, verður ikki ávirkað av rentuhækkingini, sum hava gildi frá 12. oktober.

Føroya Banki upplýsir, at skiftandi rentan á bústaðarlánunum, Skáalán og Búlán, hækkar úr 4,45 prosentum upp í 4,75 prosent. Samstundis sum nakrar útlánsrentur hækka, hækka fleiri innlánsrentur eisini. Renturnar á 60-ára konto, Bústaðarkonto og Lutakonto hækka 0,25 prosentstig.

Føroya Sparikassi lagar eisini rentuna á lánum við skiftandi rentu til hækkaða rentustigið, eftir at Tjóðbankin hevur hækkað leiðandi rentuna. Rentan á innláni uppá uppsøgn og flestu útlán hækka við 0,25 prosentstigum. Bústaðarlán, við lægstu rentu, hækka tó við 0,30 prosentstigum úr 4,45 upp í 4,75 prosent p.a. Realkreditlán verða ikki ávirkað av hesi rentubroyting

Við virknaði frá 13. oktober 2006 fer lægsta bústaðarrentan úr 4,45 upp í 4,75 prosent p. a. Aðrar útlánsrentur hækka í meginregluni 0,25 prosentstig.

Flestar innlánsrentur hækka við 0,25 prosentstigum, og tað ber m.a. í sær, at rentan á konti við uppsøgn, kapitalpensión, lutapensión og á bústaðarkontum hækkar tilsvarandi. Rentan á vanligum innláni uttan uppsøgn verður óbroytt.

Tey, ið higartil hava fingið Realkredittlán, verða ikki ávirkað av broytingini.

Hetta er fjórðu ferð, at rentan er hækkað í ár, og ábendingar eru framvegis um, at aðrar rentuhækkingar standa fyri framman, verður sagt úr Føroya Sparikassa.



# Bók um Frans í Assisi




**Bókadeild KFUMs hevur givið út bókina »Frans í Assisi«, sum Elin Mortensen hevur skrivað**

BÓKAÚTGÁVA



*Elin Mortensen, fyrrverandi lærari í Sankta Frans skúla hevur skrivað bókina um Frans av Assisi*

Í prædikum og andaligum talum verður ofta tikið til Frans í Assisi, serliga verða sólsangurin og bønin hjá Frans í Assisi tikin fram.

Elin Mortensen var í eitt mannaminni lærari í Sankta Frans skúla í Havn. Tá var hon biðin at fáa sær kunnleika um henda merkismann í sambandi við árliga minningardagin 4. oktober, tá ið lærarar og næmingar koma saman til veitsluhald. Hetta gjørdi, at Elin gjøgnum árini kom at greiða fleiri hundrað næmingum frá um Frans í Assisi.

Men Elin helt, at hesin merkismaður enn hevur nógv at læra okkum nútíðarmenniskju, tí fór hon at savna tilfarið í eina bók.

Og nú er henda góða og lættlesiliga bók komin í bókabúðirnar.

Janus D. Guttesen hevur prýtt bókina við vøkrum tekningum, sum hava samband við tað, ið stendur í bókini.

Frans í Assisi er 56 síður og kostar 110 krónur.

# Vit vóru skelkað

**Arbeiðsfólk hjá Faroe Jet vóru skelkað, tá tey frættu um flogvanlukkuna á Stord. Jóhan Simonsen, stjóri í Faroe Jet sigur, at øll flogferðsla hevur mannagongdir til slíkar støður, men ásannar, at tað er ringt at seta seg í eina slíka støðu.**

FLOGVANLUKKA
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Johan E. Simonsen, stjóri í FaroeJet*

Jóhan Simonsen, stjóri á Faroe Jet, var á veg vestur á flogvøllin, tá hann hoyrdi um flogvannlukkuna á Stord. At byrja við helt hann ikki, at vanlukkan var so umfevnandi, men so hvørt sum fleiri upplýsingar komu inn, sá hann álvaran í vanlukkuni.

### Skelk

Hann sigur, at starvsfólkini hjá Faroe Jet vóru skelkað eftir vanlukkuna hjá Atlantic Airways á Stord.

- Hetta hevur havt stóra ávirkan á Faroe Jet. Fleiri av okkara starvsfólkum hava arbeitt hjá Atlantic Airways, og tí eru fleiri, sum kendu Gudruna. Tankarnir leita sjálvsagt til familjuna, men eisini til Atlantic Airways, sum tíverri er rakt av vanlukkuni.

Hann dugir tó illa at meta um, hvørt hetta kemur at ávirka flogferðsluna framyvir.

- Eg dugi ikki heilt at meta um, hvørt hetta fer at ávirka flogferðsluna framyvir. Men síðani flogvanlukkuna hava fólk ikki setst aftur.

# Allur ivi skal beinast burtur

**Bjarni Djurholm er landsstýrismaður í loftferðslumálum. Hann harmast um syndarligu vanlukkuna í Stord, har ið eitt flogfar hjá Atlantsflog fór av breytini og rendi á ein bakka**

ALMENN LOFTFERÐSLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Bjarni Djurholm heldur, at umdømið hjá Atlantsflog skal vinnast aftur við at beina burtur allan iva.

- Allar atfinningar verða tiknar álvara, og nœ er tað týdningarmikið, at allur ivi verður beindur til viks, heldur Bjarni.

- Felagið er undir umsjón av Statens Luftfartsvæsen, og teir hava eftirlit við, um alt er í lagi. Møguliga er tað nøkur viðurskifti á gólvinum sum ikki eru í lagi. Tað veit eg ikki, men tað skal kannast, um nakað er galið innanhýsis í felagnum.

- Hetta var ein syndarlig vanlukka, sum gav eina ógvusliga eksponering av flogfelagnum, og tað er sjálvandi ikki positiv umtala. Men vit kunnu takka várharra fyri, at vanlukkan ikki kravdi enn fleiri mannalív.

Vanlukkan fer tó ikki at framskunda arbeiðið við at leingja flogvøllin í Vágum.

- Arbeiðið gongur sína gongd. Flogvøllurin verður yvirtikin í næstum, og arbeiðið við at leingja flogvøllin fer vónandi í gongd í 2007 ella í seinasta lagi 2008. Arbeiðið kann ikki ganga skjótari, sigur Bjarni Djurholm at enda.



*- Vit kunnu takka várharra fyri, at vanlukkan ikki kravdi enn fleiri mannalív, sigur Bjarni Djurholm*